

# Vil hava Bjarnoynna sum tilbúgvingarmiðstøð

**Jan Müller**

31.03.2014 - 14:31

Oljan.fo

Tá oljuvinnan fer í gongd í Barentshavinum og serliga so norðarlaga sum í Hoop-økinum, verða einir 300 kilometrar til eitt nú Hammerfest, og tað kann elva til trupulleikar.

Tað heldur í hvussu er nevndarformaðurin í North Energy, Johan Petter Barlindhaug. Hann vísir á, at tann langi teinurin kann geva tyrlunum trupulleikar, og tí verður tilbúgvingin ikki nóg góð. Hansara uppskot er at brúka Bjarnoynna sum tilbúgvingarmiðstøð.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at North Energy-formaðurin mælir til at brúka Bjarnoynna sum tilbúgvingarmiðstøð. Í hansara hugaheimi er als eingin ivi um, at tað er tað rætta, men spurningurin er bara, hvør skal gjalda.

-Skulu vit hava nógv virksemi norðuri í Barentshavinum, mugu vit hava eina tilbúgving, sum ger tað trygt hjá fólki at arbeiða har. Og tá er Bjarnoyggin tann besta loysnin, sigur Johan Petter Barlindhaug við TekniskUkeblad.

**Lítil íløga**

Bjarnoyggin, sum er millum norska meginlandið og Spitsbergen, er friðað burtursæð frá einum parti, sum hýsir einari veðurstøð. Endamálið við at friða umhvørvið á oynni er at varðveita sjófuglin og vistfrøðina sum heild. Men friðingin er eingin forðing, heldur Berlindhaug.

-Økið rundan um veðurstøðina er stórt, og har er pláss fyri einari tilbúgvingarmiðstøð, sigur hann. Sjálvur heldur hann ikki, at tað er neyðugt við teimum heilt stóru íløgunum á oynni. Lendingarmøguleikarnir skului betrast, ein tyrluhangarur skal byggjast og eini hús, sum skulu hýsa fólki í sambandi við eitt møguligt óhapp.

-Hetta er ein lítil íløga, sum hevði bøtt trygdina munandi, og sum hevði gjørt tað munandi tryggari hjá fólki, sum arbeiða í Barentshavinum, sigur Johan Petter Berlindhaug við TekniskUkeblad